## 67. bind av Varðanum fyri 2000 er komið

Innihaldið er sum árini frammanundan fjølbroytt við søgum, frásagnum, yrkingum bókaummæli.

Jóhan Hendrik Winther Poulsen skrivar um vísindamannin Christian Matras, sum í ár hevði verið 100 ár, um hann hevði livað.

Magnus Brahé Jørgensen skrivar grein um Føroya kirkjusøgu. Í hesi greinini viðger hann ta fyrstu tíðina, eftir at kristindómurin varð settur í gildi í Føroyum og trúbótina.

Í ár eru 100 ár síðani William Heine-sen varð føddur. Í tí sambandi hevur Bergur Hansen bókmentafrøðingur grein um skald-skapin hjá Williami, sum hann nevnir: Paradis á jørð. Ella hvussu mýtan lyftir skaldskapin hja Williami Heinesen.

Páll Mortensen skrivar grein, sum hann nevnir Jólagávur.

Egon Hansen, sum í fleiri ár hevur havt greinir við evni úr Nólsoyar søgu, skrivar hesaferð um hundar í Nólsoy.

Tann ungi Agnar Jógvansson hevur grein við heitinum: Søgan um lívið og deyðan.

Tann ættarfróða Freydis Poulsen skrivar hesaferð grein um ættargrein av Blankskála.

Willum Peder Trellund eitur danskur yrkjari. Hann hevur givið út tvey yrkingasøvn. Ragnar M. Egholm hevur týtt nakrar av yrkingum hansara.

Brot úr farnum tíðum er heitið á grein eftir Nancy Vesturbú. Her skrivar hon um tannarøkt, tá ið hon var ung.

Bjørgfinnur Nielsen hevur hesaferð nakrar yrkingar.

Nicodemus Rasmussen hevur skrivað av hundraðtals síður úr vártingbókini um Eysturoyar várting. Hesaferð úr vártingsbókini 1694-96.

At enda er bókaummæli eftir Berg Hansen, sum hann nevnir Grýtuta leiðin gjøgnum 20. øld. Bergur ummælir bókina: William ummælir fagrar listir. Hetta er greinasavn eftir William Heinesen, sum Jóhannes Enni sáli savnaði.

67. bind av Varðanum er 173 síður til støddar og kostar 190 kr. í bókabúðunum.

## »Vakrastu ævintýr Hans Christian Andersens«

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út myndabókina

»Vakrastu ævintýr Hans Christian Andersens« er stór skreytbók í føgrum litum við 8 av kendastu ævintýrum H. C. Andersens: Svínadrongurin, Prinsessan á ertrini, Snjódrotningin, Nýggju klæði keisarans, Hin stinni tinsoldáturin, Gentan við svávulpinnunum, Hin lítla havfrúgvin og Granntræið.

Hesi ævintýr hava í meira enn hálvaaðru øld hugtikið bæði børn og vaksin, og enn á okkara døgum eru tey høgt í metum. H. C. Andersen dugdi sum fáur við sínum sveimandi og sjáldsama hugflogi at festa tankar sínar á blað, soleiðis at lesarin stundum kendi seg drignan úr trupla gerandisdegnum inn í eina loyndarfulla verð. Ævintýr hansara siga frá kenslum og longsli menniskjans, og djórini letur hann fáa somu eginleikar bæði í góðum og ringum. Hann skrivar um kærleika og líðing, gleði og sorg.

Arnica Esterl hevur savnað og partvís stytt nøkur av hesum ævintýrum. Russiska listakvinnan, Anastassija Archipowa, hevur við sínum framúr góðu gávum megnað at givið bókini sín serstaka dám. Myndir og tekstur fylgjast so væl í samljóði hvørt við annað, at alt rennur sama í eina eind. Heri Jacobsen hevur týtt bókina.

Vakrastu ævintýr Hans Christian Andersens er 192 bls., innbundin í stíva permu við løriftsryggi og lesibandi. Bókin kostar kr. 225 í bókabúðunum. Hestprent stóð fyri prenttilgerðini.

Jørgen-Frantz Jacobsen og William Heinesen

## Úthavsdagar – Oceaniske dage

Í sambandi við 100-ára dagin hjá Jørgen-Frantz Jacobsen tann 29.11. kemur bókin Úthavsdagar – Oceaniske dage út við greinum um ritverk hansara og um tað hjá Williami Heinesen.

Har eru greinir um skaldsøguna og um filmin »Barbara« ávikavist eftir Kirsten Didriksen og Arne Engelstad. Turið Sigurðadóttir skrivar um essay og yrkisprosu hansara. Gianfranco Contri lýsir útgávuna av italsku týingini av Barbaru. Leyvoy Joensen lýsir leiklutirnar hjá Jørgen-Frantz Jacobsen og Williami Heinesen í tjóðskaparligu menningini í 20. øld. Hanne Flohr Sørensen skrivar um brævaskiftið millum høvundarnar.

Ritverkið hjá Williami Heinesen verður viðgjørt í fleiri greinum, m.a. eftir Torben Brostrøm professari, sum skrivar um yrkingar hansara. Harafturat viðger Vár í Ólavsstovu Laterna magica, Bergur Hansen og Åsfrid Svensen viðgera tað »karnevalistiska«, Soffía Auður Birgisdóttir barnsburðarmyndir í stuttsøgum og Malan Marnersdóttir viðger Tårnet ved verdens ende. Anne Kari Skarðhamar og Bente Aamotsbakke skriva um yrkingar eftir William Heinesen.

Tvær greinir seta ljós á ritverkið úr øðrum sjónarhornum. Marianne Clausen lýsir týdningin, sum andaligi vísusangurin hevur havt fyri høvundarnar. Írski professarin Seamus Deane lýsir, hví enskt gjørdist írskt bókmentamál, og skapar á tann hátt saman við greinini hjá Leyvoy Joensen ein nýggjan karm um tey bæði danskt mæltu, men kortini føroysku ritverkini.

Bókin Úthavsdagar – Oceaniske dage er úrslit av ráðstevnuni »Úthavsdagar« í Norðurlandahúsinum 25.-27. mai í ár. Bókmentafrøðingar, høvundar og bókmentaáhugað úr Norðurlondum tóku lut í ráðstevnuni. Bókin er 220 bls.

Ritstjórar eru Malan Marnersdóttir og Turið Sigurðardóttir.

Útgevari: Norðurlandahúsið og Føroya Fróðskaparfelag.

Bókin verður at fáa í bókhandlunum og hjá Bókamiðsøluni:BMS@post.olivant.fo.

Kostnaður 185 kr.

## Føroyski Lummakalendarin 2001 er komin

Innihaldið í lummakalendaranum er fylgjandi:

- Halgi- og merkisdagar
- Gomlu føroysku dagaheitini
- Klokkutíðir fyri mánan
- Føroysk heiti fyri mánastøðurnar
- Telefontænastur og telefonsamband við útheimin
- Postnummur í Føroyum og postgjøld
- Adressuyvirlit
- Tímatalva

Til at halda skil á tíðini eru yvirlit fyri hvønn mánað (ein síða fyri hvønn) og yvirlit fyri hvørja viku í árinum (tvær síður fyri hvørja viku).

Ein perforering er gjørd í niðasta horn á hvørjari síðu, so til ber at merkja av, hvussu langt árið er liðið.

Eisini eru heildaryvirlit fyri bæði árini 2001 og 2002. Harumframt eru eyka síður gjørdar at skriva á.

Kalendarin er gjørdur í støddini A6, 10,5 x 14,8 cm.

Kalendari er spiralinnbundin, so hann kann liggja uppsligin á borðinum. Men kann eisini havast í lummanum.

Perman eru úr plasti, við lummum. Á permuni er mynd av Tinganesi. Til ber hjá tí einstaka at seta sín persónliga dám á kalendaran. Til dømis kann forsíðan skifastu út við eini fotomynd ella tekning.

Hann er sera væl egnaður til skúlaungdóm, fólk í starvi á skúlum, á stovnum og á skrivstovum, og til fólk í vinnu á sjógvi og landi, og hann er eisini væl egnaður sum dagbók.

Útgevari er TJØRN sp/f.

Einars Prent hevur prentað

Kalendarin fæst í bókabúðunum og á posthúsunum kring landið og kostar 80 kr.

## Lítli reyði bilurin




Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út føroyska teldubók

Andrias Hammer hevur gjørt telduforritið og lagað myndirnar til teldu.

Tað hevði kanska verið rættast at sagt bøkur heldur enn bók, tí fløgan um Lítla reyða bilin er í veruleikanum 4 smábarnabøkur í einum, sum Matthew Price hevur skrivað, Steve Augarde teknað og Niels Jákup Thomsen týtt úr enskum.

Tær fýra bøkurnar eita: Lítli reyði bilur kemur illa fyri, Lítli reyði bilur spælir taxa, Lítli reyði bilur er fyri óhappi og Lítli reyði bilur í kavanum. Tvær av bókunum eru komnar út herfyri: Lítli reyði bilur er fyri óhappi og Lítli reyði bilur í kavanum. Men hóast bøkurnar eru ætlaðar teimum 2-4 ára gomlu, er teldubókin ætlað teimum 4-8 ára gomlu. Av royndum vita vit, at sera fá telduspøl eru til júst henda aldursbólkin. Tey, sum eru, eru á fremmandum máli, og tað er spell, tí tað eru hesi, ið gera sínar fyrstu royndir við telduni.

Tá ið tú setur fløguna í telduna, kemur ein valmynd upp á skíggjan. Har kanst tú so velja antin eina av teimum 4 søgunum ella at spæla, tí fýra einføld telduspøl eru eisini á fløguni: Tú kanst mála bilin, lata Dukku-Lisu í, spæla kross og bolli ella spæla á ljómborð. V.v. søguni kanst tú velja at lata telduna blaða og lesa fyri tær, ella tú kanst sjálvur blaða. Tá ið tú tá leitar við músini á skíggjanum, broytist pílurin við hvørt til eina hond – og tá er okkurt óvæntað at síggja. Trýstur tú á tekstin, verður hann lisin upp.

Teldufløgan Lítli reyði bilur kostar 180 kr. og fæst í bókhandlum, fløguhandlum og leikahandlum um landið.

## Føroyar – Myndabók

Nýggj myndabók við myndum hjá Absalon Hansen er komin í bókabúðirnar. Jens Pauli Heinesen hevur skrivað ein innleiðandi tekst, sum er týddur til danskt og enskt. Inni í bókini eru stuttir tekstir, og staðarnøvn eru sett á flest allar myndir.

Bókin verður fyrst av øllum borin fram av myndunum. Myndirnar eru tiknar víða um í Føroyum og vísa Føroyar frá mongum síðum: Summar og vetur, vár og heyst, bygdalív og býarlív, bjørgini og strondin.

Tekstirnir, sum eru á føroyskum, donskum og enskum, stiðja undir myndirnar. Og staðarnøvnini hjálpa lesaranum at finna, hvar í landinum, myndirnar eru tiknar.

Forlagið AZ gevur bókina út. Bókin er 140 blaðsíður.

Myndirnar hevur Absalon Hansen tikið. Jens Pauli Heinesen hevur skrivað tekstin. Jens Pauli Heinesen hevur eisini gjørt donsku týðingina. Claire F. Thomsen hevur týtt til enskt.

Repro-Z hevur gjørt layout, repro og umbróting. Bókin er prentað hjá Nørhaven.

Bókin kostar kr. 315,00 í bókabúðunum.

# ítróttur

Nr. 245 • mikudagur • 20. desember 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

## UEFA roynir nú graslíkisvøllir



*Europeiska fótbóltssamgongan kannar í løtuni, hvørji krøv skul setast til graslíki, sum skal nýtast í altjóða høpi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Europeiska fótbóltssambandið ásannar nú, at graslíki kann gerast eitt seriøst alternativ til vanligar grasvøllir, og møguliga verða altjóða dystir loyvdir um stutta tíð**

GRASLÍKI
*Jákup Mørk*

Eftir at UEFA annars alla tíðina hevur verið ímóti, at altjóða dystir verða lovydir á graslíki, er nú líkt til, at vend er komin í hesum víkjandi.

Orsøkin til broyttu støðuna er fyrst og fremst tann, at nýggi, sonevndu triðja ættarliðs-vøllirnir, eru meinlíkir grasi at spæla á, og ikki hava somu vansar, sum fyrsta- og annað ættarliðsvøllirnir. Vansarnir við hesum hava verið eitt ónáttúrligt lop á bóltinum, umframt stóra talið av liðbandsskaðum og brennimerkjum, sum hava staðist av hesum.

Fyrsta ættarliðsvøllir eru teir, sum bert hava graslíki, meðan næsta ættarlið verður roknað sum teir vøllir, har sandur eisini verður nýttur.

Triðja ættarlið eru vøllir, har graslíki og sandur vera nýtt, men har eitt lag av gummikúlum síðani er lagt oman á sandin. Partar av slíkum vøllum verða í løtuni royndir í Klaksvík og Gøtu.

### Nógvir fyrimunir

Í løtuni royndir UEFA at kanna, hvussu hesir vøllir roynast, og er ætlanin so, at nøkur krøv verða sett fyri, hvussu vøllirnir skulu vera, fyri at kunna geva teimum altjóða góðkenning.

Í mun til vanligt gras, verður nú roknað við, at graslíki hevur somikið nógvar fyrimunir, at hetta allar helst fer at verða nýtt á fleiri leikvøllum runt í Europa.

Millum fyrimunirnar verður rokna stóru nýtsluna, sum graslíkið tolir, eins og viðlíkahaldið er nógv minni enn við vanligum grasi. Hetta viðførir so eisini, at leikvøllirnir gerast nógv betri egngaðir til tiltøk av ymsum slag so sum konsertir og annað, tí fyrireikararnir sleppa undan stóru útreiðslunum av at verja grasið.

### Europa Cup í Klaksvík

Hvørja ávirkan hetta kann hava fyri føroyskan fótbólt, kann í løtuni vera eitt sindur torført at meta um. At feløgini fáa møguleika at spæla heimadystirnar á egnum vølli, vil sjálvandi vera kærkomið, men hinvegin treytar hetta eisini, at umstøðurnar kring vøllin eru tær røttu.

Her hevur UEFA tó áður gjørt undantøk hjá føroyskum feløgum, so eitt nú er als ikki óhugsandi, at vit innan stutta tíð kunnu upplivað, at europa-cup dystir kunnu leikast aðra staðni enn á Svangaskarði og í Hvalba. Hvør veit. Kanska Klaksvíkin ella Gøta eisini kunnu gerast europeiskir vertir innan langa tíð.

## Remy vann fjórðu kappingina

**Dartsambandið skipaði um vikuskifti fyri fjórðu einstaklingakappingini hetta kappingarárið.**

DART
*tíðindaskriv*

Í einmansleiki vóru 14 luttakarar. Alvin Egholm og Remy G. Hansen spældu seg fram í aðra hálvfinaluna. Hetta gjørdist ein sera vælleiktur dystur, sum Remy vann 5-2.

Í hinari hálvfinaluni hittust brøðurnir Poul Poulsen og Jens Petur Poulsen. Jens Petur hevði frammanundan hesi kappingini havt eitt sera vánaligt kappingarár, men leygardagin lá betur fyri. Dysturin gjørdist sera javnar og Poul og Jens Petur fylgdust allan vegin til 4-4. Í avgerðandi settinum fylgdust teir eisini allan vegin niður. Báðir høvdu møguleikan at vinna settið, men endin var at Jens Petur dró longra stráðið.

Í finaluni fylgdust Jens Petur og Remy til 2-2, men so skifti Remy gear. Hann vann tey næstu 4 settini og sostatt finanluna 6-2.

### Fáir í tvímansleiki

Í tvímansleiki var uppmøtingin einki serlig. Einans 9 pør luttóku, men hóst tað var spælt av lívsins kreftum.

Henrik Pedersen/Poul Poulsen spældu seg sum vant í hálvfinaluna. Har vunnu teir 5-0 á Bjarna í Stórustovu/Chris Nielsen. Í hinari hálvfinaluni spældu Petur Grønagarð/Henning móti Jóhan Hansen/Jens Albert Simonsen. Hesin dysturin gjørdist ein rættur gysari. Teir fylgdust til 2-2. Síðan løgdu Petur og Henning seg fram um 4-2, men Jóhan og Jens Albert stríddu seg upp aftur á 4-4.

Í avgerðandi settinum vóru Jóhan og Jens Albert langt á odda, men teir vóru týðuliga merktir av nervum og kláraðu ikki at “lukka” settið. Tá Petur og Henning fingu møguleikan at “lukka” var heldur ikki frítt, at teir høvdu nervar, men eftir at Jóhan og Jens Albert høvdu roynt seg við 15 pílum og Petur og Henning við 10 pílum, eydnaðist Peturi at “lukka” settið og harvið vunnu Petur og Henning dystin 5-4.

Finalan var ikki so góð, men hinvegin sera jøvn. Poul/Henrik og Petur/Henning skiftust um at vinna settini heilt upp til 4-4. Av teimum fyrstu 8 settunum kundu 7 teirra verið farin báðir vegir, so tað var næstan bara ein spuringur um, hvør hevði høvdið kalt, tá settini skuldu “lukkast”. Seinastu tvey settini kundu eisini verið farin báðir vegir, men Poul og Henrik vunnu bæði, og teir vunnu sostatt finaluna 6-4.

Allir vinnararnir fingu heiðursmerkir og steyp frá Føroya Banka og vunnu sær samstundis fleiri týdningarmikil stig til styrkilistan.

## Seinasti dysturin

**Grundspælið hjá monnum endar í kvøld, tá VÍF og KÍF spæla dystin, sum varð fluttur frá seinasta vikuskifti**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

42. og seinasti dysturin í grundspælinum hjá monnum verður leiktur í Vestmann, har fremsta og aftasta liðið hittast.

At siga aftasta liðið um kollfirðingar, er kanska dekan ov nógv sagt, tí hóast teir í løtuni eru niðastir, so fara teir fram um Tjaldur, tá stigini verða hálvbýtt. Hetta tó treytað av, at teir ikki tapa við 45 málum.

Tað kann neyvan hugsast, at tapið verður somikið stórt, men einki er at ivast í, at VÍF eru stórfavorittar undan dystinum. Vinnur VÍF dystin, merkir tað samstundis fyri teir, at teir enda grundspælið við fullum stigatalið, og at javnleikurin móti Kyndli sostatt var kostnaðarleysur.

Tá hesin dysturin er fingin frá hondini, verður farið í drúgva jólafri. Fyrstu mansdystirnir eftir hetta verða ikki fyrr enn 28. januar. Hetta tí landsliðshondbólturin ger, at kappingin verður løgd still trý tey fyrstu vikuskiftini í nýggja árinum.

## Coca-Coal finalan flutt

Hondbóltssambandið hevur boðað frá, at finalan í Coca-Cola kappingini, sum vanliga er fyrsta vikuskiftið í februar, nú er flutt frá 3. til 10. februar.

Orsøkin til flytingina er, føroyska U-21 landsliðið fyrst í februar skal spæla undan-undankapping til EM. Allir leikararnir á hesum liði er at kalla fastir fúsir á besta liðnum í ymsu feløgunum, og tí hevði frávera teirra helst ávirka leikligu dygdina í finaluni skeivan vegin.